MARKAMÓTSNEVNDIN

Tórshavn 26. august 2020

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Mál viðvíkjandi borgara yvir 67 ár búsitandi á stovni

Almannaverkið heitti við skrivi dagfest 9. juli á Markamótsnevndina um at taka støðu til markamót 3 í markamótsskjalinum viðv. § 14 í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og § 32 í forsorgarlógini.

Ítøkiliga málið er um borgara yvir 67 ár, sum leingi hevur búð á stovni, rindað av Almannaverkinum. Borgarin hevur verið sálarsjúkur, men er ikki so merktur av sálarsjúku longur, heldur meira røktarkrevjandi. Borgarin er eftir avgerð hjá upptøkunevndini fyri búpláss hjá Kommununi 5. november 2019 visiteraður til kommunalt búpláss, men stendur á bíðilista (sonevndum raðfestum bíðilista). Sum skilst er einki pláss tøkt í løtuni, og sambært kommununi er torført at siga, nær pláss verður tøkt.

Ósemja er sostatt ikki um, hvør myndugleiki hevur ábyrgd. Ósemjan er heldur um, hvør myndugleiki skal rinda útreiðslurnar til stovnsplássi, meðan borgarin bíðar eftir kommunala búplássinum.

Markamótsnevndin er samd í, at borgarar, ið eru visiteraðir til búpláss á eldraøkinum, kunnu detta niður ímillum, um ov long tíð gongur, til pláss gerst tøkt. Tað verði seg sjúklingar, sum eru liðugt viðgjørdir á sjúkrahúsi og ikki kunnu vera heima, ella borgarar, ið búgva á øðrum landsstovni ella heima.

Kortini er spurningurin, nær gjaldsskyldan fyri kommunalu umsorganar- og eldratænastuna tekur við, ikki greiddur í lóggávuni, heldur ikki í komandi sokallaðu vælferðarlógini. Grein 68 í komandi vælferðarlóg, sum ikki enn er komin í gildi, ásetir, at Almannaverkið kann selja tænastur til eitt nú eldratænastur, ið hava tørv á kapasiteti, men ásetingin sigur onki um, nær gjaldsskyldan tekur við fyri kommunurnar í máli, har borgari er hýstur annað stað, meðan hann er í bíðistøðu. Heldur ikki almenna skyldan eftir § 3 í Løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. loysir henda ítøkiliga spurning.

Eftir verandi lóggávu hava borgarar ikki rættarkrav uppá búpláss til ávísa tíð. Heldur ikki áleggur nøkur lóg kommunum skyldu at rinda fyri tað búpláss ella uppihald, sum borgararnir hava í bíðistøðu. At broyta skipanina burtur frá verandi játtanarstýrdu skipan yvir móti skipan, har borgarin í størri mun hevur rættarkrav uppá búpláss, evt. innan ávísa freist, er ikki

markamótsspurningur, ið kann greiðast eftir verandi lóggávu. Spurningurin er politiskur og má, um tað skal vera, viðgerast sum lógarbroyting.

Bárður Larsen, formaður

Ása Olsen

Katrin Danielsen